Tað er ísakalt, og vindurin strýkur um gøturnar. Tá er gott hjá heimleysum føroyingi at kroka undir Longubrúgv í Keypmannahavn

Framhald av síðu 7

men tað er ikki Jakob, sum eigur telduna. Hann eigur bara tað mest neyðuga, sum skal til fyri at klára seg nøkunlunda.

Tá klokkan er farin av seks, kemur ein maður undan brúnni. Hann gongur seigliga, hevur nakrar plastikkposar í hondini, og hann er ílatin eina tjúkkan, bláan jakka. Hann er stórur og prúður, og stóra reyðliga skeggið tykist litfagurt afturímóti restina av manninum.

Tað er Jakob Thomsen, sum er á veg heim — ella so frætt heim, sum hann nú einaferð sleppur. Fyri 20 árum síðani flutti hann úr Føroyum, og hann hevur ongantíð leitað aftur til heimlandið. Hann arbeiddi fyrstu árini í Danmark, fann sær tó ongantíð nakað býli, og endin varð, at hann slóð seg til táls við at búgva á gøtuni. Heimleysur.

Jakob hevur beina kós móti skotinum, har hann hevur nakrar av sínum ongum liggjandi.

— Góðan dag, royna vit, og tað bítur á beinanvegin.

— Góðan dag, svarar Jakob reystliga.

Hann er beinan vegin hugaður at práta, og tað føroyska tykist ongan skaða hava fingið av teimum mongu árunum í Danmark. Hann tveitir posarnar frá sær og dregur proppin av eini ølfløsku. Hann stoytir í eitt hvítt plastbikar og setir upptrekkjaran útyvir hálsin á ásettu ølini. Hann hevur eisini lok til plastbikarið, men áðrenn hann leggur tað omaná, fær hann sær ein slurk av ølinum.

Tað er einki lív

Tað er bítandi kalt, men tað tykist ikki nerva Jakob, sum hevur sett seg á grøna kassan.

— Eg havi búð úti í so nógv ár nú, so eg eri vanur við alt veður. Tað er sera sjáldan, at eg eri kaldur, sigur hann.

— Hetta er einki lív at liva, men eg havi vant meg við tað. Tað er strævið at ganga soleiðis, men eg havi einki val. Eg kann ikki fáa arbeiði, eg havi onga útbúgving, og mær hevur dámað ov væl tað váta slagið, sigur hann.

Fyri jól var hann ein av mongum heimleysum, sum vóru við í eini greinarøð hjá danska Ekstrabladnum. Eftir at ein lítil mynd hevði verið av honum í blaðnum, var tað onkur føroyingur, sum forbarmaði seg yvir hann. Nakað aftaná fekk hann umvegis »Projekt Udenfor«, sum ger hjálpararbeiði á gøtuni í danska høvuðsstaðnum, føroysk blað og føroyskan mat.

— Tað var gott at fáa bløðini og frætta eitt sindur av tíðindum heiman, men føroyska matin geri eg einki við. Magin tolir ikki slíkan mat longur, sigur hann og tekur plastbikarið við øli upp.

Umframt droparnar úr teimum grønu fløskunum, kemur tað fyri, at tey á »Projekt Udenfor« koma við suppu ella onkurm løttum til matna.

Gekk bara skeivan veg

Hóast Jakob Thomsen er føroyingur og búði í heimlandinum fram til fyrst í áttatiárunum, tá hann misti arbeiðið hjá sær og valdi at royna eydnuna í Danmark, hevur hann ongar ætlanir um at flyta heima aftur til Føroya.

Hann fær danska almannaveiting, og hann klárar seg nøkunlunda við teimum pengunum. Krónurnar verða ikki brúktar til klæði ella mat, men hann fær tað, sum hann heldur seg hava mest fyri neyðini.

Jakob er als ikki sinnaður at tosa um ættarbond ella fortíðina, men hann greiðir tó frá, at hann hevur arbeitt og búð á Sandoynni, í Havn og eitt stutt skifti í Klaksvík. Hann var eisini í Grønlandi nøkur ár, og hann heldur, at tað var har, at hann rættiliga koma á skeiva sporið.

— Mær dámdi ov væl tað váta slagið, eg hevði onga útbúgving, og so gekk tað ikki í longdini.

Tað gekk støðugt skeiva vegin, og áðrenn hann varnaðist tað, búði hann á gøtuni í Keypmannahavn — arbeiðsleysur, heimaleysur og einsamallur.

Og soleiðis hevur støðan verið mongu seinastu árini, og Jakob roknar ikki við, at hetta fer at broytast í framtíðini.

— Hetta er einki lív at liva, men eg havi vant meg við tað. Tað er strævið at ganga soleiðis, men eg havi einki val. Eg kann ikki fáa arbeiði, eg havi onga útbúgving, og mær hevur dámað ov væl tað váta slagið, sigur Jakob Thomsen

Passar seg sjálvan

— Eg fái góðan frið her í Keypmannhavn. Eg havi ikki so góðan hug at koma í samband við fólk, men við hvørt kemur tað fyri, at onkur steðgar á og hevur hug at práta, og tað er eisini í lagi. Men tað er nú meira vanligt, at fólk lata sum einki, tá tey ganga framvið mær, greiðir Jakob frá.

Hann er bara ein av mongum heimleysum í Keypmannhavn, men munurin millum hann og hini er, at hann er føroyingur.

Jakob hevur fastan bústað undir Langubrúgv, men um summrarnar kemur tað meira enn so fyri, at hann leitar yvir á ein bonk í eini viðalund nærindis at sova. Tað er betur at sova á einum bonki enn á einum pappundirlagi, heldur hann.

Dagarnir verða brúktir til at spáka í Keypmannahavn við plastikkposunum í hondini. Hann ger ikki nógv hóvasták burturúr, men tað er lítið at ivast í, at tann prúði føroyingurin sæst aftur í býarmyndini.

Og tá tú sært hann koma spákandi, líkist hann tí, sum hann í veruleikanum er.

Ein einsamallur og heimleysur føroyingur í Keypmannahavn.

Ladonia

- Landið sum finst, bert ikki í ”veruleikanum”



Kim Simonsen

Bæði BBC, Reuter og CNN søgdu herfyri frá, at 3000 pakistanar í ár hava søkt um friðskjól í landinum Ladonia, ið sigur seg vera nýggjastu tjóðina í Norðurlondum. Ladonia er bert ein ferkilometur í stødd, og er sett á stovn 2. juni 1996 í landspartinum Skåne í Svøríki. Har eru umleið 6000 borgarar úr øllum heiminum, og eini 2500 umsóknir um statsborgaraskap eru ikki viðgjørdar enn. Landsins mál er eftir samtykt bert eitt orð, ið er orðið waaal, og ein kann seta so nógvar bókstavir á sum ein vil, siga hetta á fronskum, enskum, føroyskum ella hvat einum nú dámar best. Landið, ella tjóðin hevur egið flagg, tjóðsang, søgu, peningaskipan, frímerki og hevur barst fyri fullveldi og loysing frá svensku stjórnini síðani 1996.

Nógvar tjóðir eru ígjøgnum søguna dotnar sundur, hertiknar og tí í dag horvnar, og mangan gloyma vit at hugsa um, at lond sum Svøríki, Danmark og Ongland ikki altíð hava sæð soleiðis út sum hesi lond gera í dag. Og at lond sum Týskland, Frakland og Italia eru sera nýggj lond, ið eru savnað sera seint í søguni, og á henda hátt eru skapt, hetta ið vit í dag halda vera fyrndargomul. Soleiðis er ein partur av Týsklandi til dømis danskur, ein partur av Danmark svenskur, ein partur av Svoríki fyrrverandi danskur o.s.fv. Hetta er alt samalt søga, men tað er ikki ofta, at vit sígggja nýggj lond koma undan kavi, sum gosoyggin Surtsey í Íslandi. Men nú er tað hent, og m.a. svenski kongurin og svenska stjórnin hava fingið boð um, at ein nýggj tjóð hevur sæð dagsins ljós, ein serliga modernað tjóð, ið enn bert hevur tveir býir. Tá tað kemur til tjóðsang, hevur landið Ladonia tveir ymiskar, hin fyrri er “yrktur” av greiva Jan Lothe von Eriksen, og er soleiðis sæð ljóðið av einum steini tá hann verður blakaður á sjógv, og hin er ein einstakur tóni. Landið hevur Tjóðardag hin 2. juni og aðrir merkisdagar eru keypidagur, dómadagur, brennidagur o.s.fv.

Søgan aftanfyri

Landið gjørdist víðagitið, tá tað kom fram, at eini 3000 pakistanar høvdu søkt um uppihaldsloyvi í landinum, tí hesi fólk hildu, at hetta helst var eitt land sum so nógv onnur. Men kendir ladoniupolitikarar vóru noyddir at sýta hesum, m.a. við teirri grundgeving, at tað helst ikki veruliga var rúm fyri 3000 fólkum á einum ferkilometri og at tað hest ikki vóru 3000 tøk arbeiði í løtuni í landinum. Hetta økti um áhugan fyri Ladoniu, og frá at fáa eini 200 vitjandi á alnótini um dagin, byrjaði heimasíðan at fáa eini 25000 hits, og hetta tal er í alsamum vøkstri.

Alnótarlandið Ladonia er stovnað á netinum av svianum Lars Vilks, ið gjørdist kendur í Svoríki, tá hann uttan loyvi bygdi tvær risa standmyndir, ið kallast Nimis og Arx úti í svensku náttúruni. Arx er standmynd bygd úr 300 tonsum av gróti, og er ein “stein-bók”, ið ein kann lesa við at venda høvdið tann vegin, ið áhugi er fyri. Nimis er ein træstandmynd, ið er eini 200 long. Bygnaðurin av hesum ólógliga standmyndum elvdi til sera nógv sakarmál, ið fekk henda serskølt at proklamera, at landið Ladonia nú var til. Landið er sjálvandi ikki viðurkent av svenska statinum, og er sjálvandi teknist sæð ikki “til”, altso annað enn á alnótini. Men hetta hevur ikki hildið teim umleið 30.000 ferðafólkunum, sum hvørt ár vitja Ladonia frá at vitja ”landið”, sjálvt um tað ikki er lætt at vitja Ladonia, tí landið liggur við endan á eini sera brattari høvd. Tá Ladonia varð stovnað segði Lars Vilks í blaðnum Ladonian Herald, at arbeiðsloysi ikki fanst í Ladonia, og at teir veruligu trupulleikarnir í heiminum í dag ikki finnast bert í hesum at fáa okkurt at búgva í og at eta, men í at fólk ikki evna at nýta teirra hugflog.

Kaosmálastýrið og ráðharri í bókmentum

Ladonia man vera tað einasta landið í heiminum, sum hevur ein ráðharra í myndlist, ein jazzráðharra, ein heilaráðharra, ein filmráðharra og ein bókmentaráðharra. Soleiðis hevur henda tjóðin, sum hin fyrsta í heiminum t.d. eitt veranarmálastýri, eitt undirhaldsmálastýri, eitt kaosmálastýri, tilvildarmálastýri, skapanarmálastýri, eitt stýri fyri allar vindar, framtíðarmálastýri, søgumálastýri, ironi & tunglyndismálastýri, heimspekismálastýri, fótbóltsmálastýri, kærleiksmálastýri og eitt stýri fyri avskúling. Annars eru eisini ein ørgrynna av politiskum flokkum,ið m.a. eita Optimatarnir, Brigdeflokkurin o.s.frv. Meiri vanligir flokkar sum Ladoniski javnaðarflokkurin er eisini serliga vælumtóktur. Ladonia er kanska tað mest

Framhald á síðu 10